


# Hava tryggjað sær 89 dollarar fyri fatið av einum parti av oljuni

**Jógvan Hugo Gardar**

25.03.2015 - 08:39

Oljan.fo

Hóast oljuprísurin hevur verið lágur í vetur, so metir leiðslan í Faroe Petroleum (FP), at fyritøkan kann fara undir nýggjar ætlanir í ár.

58 prosent av 2015 framleiðsluni, fyri skatt, er prístryggjað við einum miðal prísi uppá 89 dollarar fyri tunnuna av olju og 0.50 bretsk pund per eind (therm) av gassi.

Í meting síni av útlitunum fyri 2015, sigur felagið í sínum ársrokniskapi, sum bleiv lagdur fram í gjar, at tey havaeina virkna og fíggjaða leitiætlan fyri 2015 og at góðar umstøður eru til at gera fleiri handlar

Leiti- og metingarætlanin hjá FP fyri 2015, fíggjað við verandi fíggjarstøðu og peningarensli, inniheldur fýra leitibrunnar, íroknað tveir uppfylgingarbrunnar á Pil fundinum, ið allir fáa 78 prosent norskan leitiskattaavsláttur

FP sigur at teir meta at leiti- og metingarútreiðslurnar í ár vera umleið eina milliard krónur áðrenn skatt.

Útbyggingar- og framleiðsluútreiðslur eru mettar til umleið 173 milliónir krónur.

Framleiðslan í 2015 mett til 8.000-10.000 føt av oljulíkum um dagin (boepd), harav 58 prosent er olja/dropagass og 42 prosent er gass.

- Felagið er sera væl fyri at gagnnýta teir møguleikar, sum marknaðarumstøðurnar kunnu geva, og gera virðisøkingar við keypi av framleiðslu, verður sagt í úttalilsinum frá nevndini í felagnum.